


# Oljuráðstevnan í Stavanger avlýst

**Jógvan Hugo Gardar**

07.04.2015 - 17:59

Oljan.fo

- Hetta er ein keðilig avgerð, men vit kunnu ikki hava eina ráðstevnu, har fyritøkur brúka nógva orku til at gera seg klár, og so fáa tey einki burturúr, sigur leiðarin fyri oljuframsýningina í Stavanger, Offshore Northern Seas (ONS), Leif Johan Sevland, í samrøðu við Stavanger Aftenblad.

Blaðið skrivar at áðrenn nýggjár gekk gott at fáa tilmeldingar, men so merkti ein at oljuprísurin helt fram at lækka, og færri og færri hava melda seg til framsýningina.

Framsýningin skuldi vera í seinnu helvt av august.

Sevland sigur at nú velja tey at hyggja framm í tíðina, og royna at skipa fyri stevnuni aftur í 2016.